# Gongutúrar í Suðuroy hvønn leygardag út á heystið

**Nú er gjørligt hjá ferðafólki, føroyingum sum útlendingum, at spáka sær ein túr í Suðroynni undir skipaðum viðurskiftum**

FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin,fo*

Í summar verður skipað fyri gongutúrum í Suðuroynni, har staðkend fólk eru við. Lagt verður fyri longu í dag - leygardagin.

Ferðavinnan í Suðuroy, Kunningarstovurnar í Vági og á Tvøroyri fara framyvir at skipa fyri gongutúrum millum bygdirnar í oynni hvønn leygardag. Málið er at fyriskipa ein túr hvønn leygardag, og at tá avtornar hevur tú møguleika at hava gingið Suðuroynna úr suðri og norðri og eystur og vestur.

Staðkend heimildarfólk eru við á hvørjari gonguferð.

Gongutúrarnir verða lýstir í bløðunum og við uppsløgum hvørja viku.

Bussur koyrir frá Kunningarstovunum til hvønn túrin.

Uppmøtingin til gongutúrarnar verður ávikavist á Kunningarstovunum í Vági og á Tvøroyri og bussarnir koyra til byrjunarstaðið fyri gongutúrin. Tá túrurin er liðugur, koyrur bussur aftur til ávíkavist Kunningarstovuna í Vági og á Kunningarstovuna á Tvøroyri.

Byrjar gongutúrurin fyri sunnan Hovsegg, fer bussurin kl. 10.00 av Kunningarstovuni á Tvøroyri og ein hálvan tíma seinri (kl. 10.30) úr Vági til byrjunarstaðið á gongutúrinum. Og hinvegin er gongutúrurin fyri norðan á oynni, fer bussurin kl. 10.00 frá Kunningarstovuni í Vági, og koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl 10.30 til byrjunarstaðið á gongutúrinum.

Eftirsum bussur koyrir, er ikki neyðugt at hava egnan bil til gongutúrarnar.

### Vágur - Famjin longu komandi leygardag

Fyrsti túrurin verður komandi leygardag 19. juni og gingið verður úr Vági til Famjin. Túrurin er léttur at ganga og tekur umleið hálvan annan tíma. Á túrinum er framúrskarandi útsýni vestantil á Suðuroynni.

Bussur koyrir frá Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 suðureftir og frá Kunningarstovuni í Vági kl. 10.30 niðan til Ryskivatn har túrurin byrjar. Tá túrurin er liðugur stendur bussur fyri gongufólkunum í Famjin og koyrir tey til ávikavist til Kunningarstovuna á Tvøroyri og í Vági.

### Vinn eitt gávukort kr. 2000,-

Tey sum tá avtornar hava gingið allar teir fyriskipaðu gongutúrarnar frá leygardegnum 19. juni til seinasta túrin tann 18. september millum Øravík og Vág (sí skránna) eru við í lutakasti uppá eitt gávukort við virði kr. 2000,-.

### Vit vóna at vísa norðingum og útlendingum Suðuroynna

Tey sum hava vitjað í Suðuroynni vita, at hon er nakað fyri seg. Og millum gongufólk er hon søgd at verða nakað heilt serligt. Vit kunnu nevna vestursíðuna av Suðuroynni við bjørgunum. Fuglameingi er sjálvandi heilt serstakt, eftirsum flytifuglurin fyrst nemur Føroyaland í Akrabergi. Jarðfrøðisliga er Suðuroyggin serstøk. Og hvør veit um ikki norðingar halda suðuroyingar verða serstakar.

Nú verður høvið hjá teimum, sum ikki hava gingið í Suðuroynni, at koma suður eitt vikuskifti í júst hesum ørindum. Fleiri hús eru til leigu bæði í teimum smærru og størri bygdunum í oynni. Til ber sjálvandi eisini at gista á teimum ymisku gistingarhúsunum í oynni. Ring til Kunningarstovurnar í Vági ella á Tvøroyri fyri nærri kunning og kanska bílegging.

Havi heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn við. Hevur tú kikara og eitt eitt kort yvir økið, har gingið verður við tær, gerst túrurin óivað meiri áhugaverdur.

Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er kr. 100,- fyri hvønn.

Bindandi tilmelding til túrarnar skal gerast á Kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342 ella á 284342 ella á Kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480 ella á 284480 í seinasta lagi hvønn fríggjadag 16.00.







## Ríðistevna hjá Vága Ríðingafelag

RÍÐISTEVNA

Í dag, leygardagin 19. juni, verður árliga ríðistevnan hjá Vága Ríðingafelag hildin Niðri við Vatn.

Byrjað verður kl. 15 við kappríðing uppi á kappríðingarbreytini, har kappast verður í trav, tvíspor ung, tvíspor 2. flokkur og tvíspor 1. flokkur.

Kl. 16.30 ella eftir kappríðingina verður tøltkapping niðri á Ringbreytini. Aftan á finaluna verður ponyríðing.

Pylsuvognur letur upp kl. 16.30 - felagssangur við undirspæli byrjar kl. 22.00.

Dansur byrjar kl. 23.30 har »Villlmenn« spæla, og er kostnaðurin 80 kr.



# Arbeiðsloysið í Føroyum tikið rættiligt dik á seg í ár

**Arbeiðsloysið er vaksið so nógv í ár, at nú er tað neyðugt at hækkað inngjaldið til ALS**

ARBEIÐSLOYSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðsloysið í føroyum veksur alsamt. Og í ár hevur tað tikið rættiligt dik á seg.

Tað vísa tey nýggjastu hagtølini hjá ALS.

Tølini frá ALS vísa at higartil í ár, er arbeiðsloysið vaksið støðugt, afturímóti í fjør



*Arbeiðsloysið í fiskivinnuni er tvær ferðir so stórt í ár, sum tað var í fjør*

Og nú tølini fyri mai mánaða í ár eisini eru tøk, sæst, at fyrstu fimm mánaðirnar í ár, er vanliga útgjaldið úr ALS tilsamans 10,7 milliónir hægri, enn tað var í sama tíðarskeiðið í fjør.

Hetta er ein øking upp á heili 49,7%.

Men teir fyrstu fimm mánaðirnar í ár, er útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli í fiskavirkisskipanini 5,2 milliónir hægri enn tað var í sama tíðarskeiði í fjør.

– Tað er ein øking uppá heili 119,6% og sostatt er arbeiðsloysið í fiskivinnuna meiri enn tvífaldað higartil í ár, afturímóti í fjør.

Fyri ALS hevur hetta við sær, at skipanin hevur havt eitt undirskot uppá 5,9 milliónir.

Stýrið fyri ALS hevur mett um støðuna fyri tað, sum eftir er av árinum og á fundi hósdagin, varð samtykt at hækkað inngjaldið í ALS.

Gjaldið er í løtuni 0,75% av lønini, men tann 1. juli hækkar tað upp í 1%.

Men hóast inngjaldið hækkar, fer ALS kortini at hava eitt undirskot upp á nakrar milliónir í ár.

Tølini hjá ALS vísa at í mai mánaða í ár var 884 fólk arbeiðsleys og tað eru næstan 300 fólk fleiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Í apríl í ár fingu 977 fólk vanligan arbeiðsloysisstuðul og tað eru 350 fólk meiri enn í apríl í fjør. Og hetta hevur verið støðan í alt ár, at arbeiðsloysið er vaksið nógv, mánað fyri mánað.

Men sum sagt er tað serliga galið í fiskavirkisskipanini

Ì mai í ár fingu 518 fólk útgjald úr fiskavirkisskipanini. Tað eru 211 fleiri enn í mei í fjør og næstan tríggjar ferðir so nógv sum í mai í 2002. Hetta er sama gongdin hinar mánaðirnar í ár, samanborið við undanfarin ár.

Ingeborg Vinther:

# Nú mugu politikarar vakna

**Nú er stundin komin til at politiski myndugleikin mál eggja uppí fyri at forða fyri, at so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag**

ARBEIÐÐLOYSI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tá ið støðan er so ring, sum hon er nú, mugu politikararnir setatiltøk í verk fyri at útvega fólki arbeiði, sigur Ingeborg Vinther*

– Nú mugu politikararnir vakna.

IngeborgVinther, forkvinna í landsins størsta fakfelag, sigur, at nú er stundin komin, at politiski myndugleikin má leggja uppí fyri at fáa arbeiðsloysið niður.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, er arbeiðsloysð munandi økt higartil í ár, afturímóti undanfarnu árum.

Serliga er arbeiðsloysið stórt hjá teimum, sum arbeiða í fiskivinnuni.

Og tað skerst ikki burtur, at ein stórur partur av arbeiðsloysinum rakar limirnar í Føroya Arbeiðarafelag.

Og Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag váttar, at nógvir limir í felagnum ganga arbeiðsleysir.

Og hon sigur, at sum utlitini eru nú, stúrir hon fyri gongdini.

– Støðan er óhugnalig. Og nú mugu politikararnir taka sær um reiggj og seta tiltøk í verk, fyri at fáa arbeiðsloysið niður.

Eitt nú heldur hon, at hendan gongdin, har so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, má steðgast.

– Fiskurin fer óvirkaður av landinum og fólkið í Føroyum gongur arbeiðsleyst og tað mugu politikararnir steðga!.

Hon fýlist eisini á, Framferðina hjá Fiskavirking.

– Fiskavirking er ein fyritøka, sum alt Føroya fólk eigur og sum alt Føroya Fólk hevur betalt skuldina hjá. Men ístaðin fyri at skapa arbeiðið í Føroyum, frættist nú, at Fiskavirking fer at skapa arbeiði í Hetlandi.

### Kunnu ikki góðtaka støðuna

Ingeborg Vinther sigur, at hon skilir ikki, at politikarnir góðtaka støðuna.

– Politikararnir eru valdir at stýra. Tað er ein mannarættir at hava arbeiðið og tað er ein mannarættur at kunna liva eitt sømiligt lív. Politikararnir eru valdir at leggja so til rættis, at fólk hava liva eitt sámuligt lív. Og tá ið støðan er so vánalig, sum nú, er tað greitt, at tíðin er komin, at politikarar taka stig til at skapa betri umstøður.

– Tað er upp á tíðina, at politikarar taka sær um reiggj, tí nú má okkurt henda. Tá ið støðan er so vánalig, mugu politisk stig takast.

Eitt nú heldur hon ikki, at tað kann góðtakast, at tað fer so nógvur óvirkaður fiskur av landinum. Fiskurin undir Føroyum er ogn Føroya fólks. Ætlanin við tí má vera, at hann skal koma fólkinum, sum er býr, til góðar. Tað merkir, at fiskurin skuldi verðið førdur til lands, virkaður her fyri síðani at skapt eitt útflutningsvirðið til samfelagið.

– Men í løtuni fer hann óvirkaður av landinum og tað eiga politikararnir at forða fyri, sigur hon.

Hon vísir eisini á tær stuðulsskipanir, sum hava verið settar í verk, bæði fyri at bjarga vinnulívinum í Norðoyggjum og í Sandoy.

Hon heldur, at ein sama slag grunnur skuldi verðið settur í verk fyri Suðuroynna, sum kundi fingið gongd á vinnulívið aftur akkurát sum Føroya Grunnurin fekk gongd á vinnulívið í Norðoyggjum og Sandoyargrunnurin fekk gongd á vinnulívið í Sandoynni.

Men er ikki gongdin tann, at tað skal vera vatntætt skott ímillum vinnulív og politikk?

– Jú, tað verður ført fram, serliga frá vinnulívinum. Men hendan støðan vísur, at vinnulívið maktar ikki at útvega fólkinum arbeiði. Fiskurin, sum fer óvirkaður av landinum, er eitt dømi um tað og tí mugu politisk stig takast.

Vinnulívið hevur ført fram, at orsøkin til, at so nógvur óvirkaður fiskur fer av landinum, er, at kostnaðarstøðið í Føroyum er so høgt, eitt nú tímalønirnar.

– Hatta er ein bílig umbering. Eg haldi, at ístaðin fyri bara at hugsa um lønirnar, eiga virkisleiðslur heldur at miðsavna seg um at hugsa nýtt. Tað, sum krevst, er nýhugsan og nýggir, nýmótans framleiðsluhættir sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur serliga, at Fiskavirking hevur nakrar serligar skyldur, tí fólkið hevur sett so nógvan pening í Fiskavirking og tí heldur hon eisini, at politikararnir serliga eiga at seta Fiskavirking krøv.

## Hjelmar hittast í Vági

Á jóansøku verður stór ættarstevna í Suðuroy fyri tey, sum eita Hjelm til eftirnavn.

Í hesum sambandi koma eini 80-100 eftirkomarar hjá Jógvani við Krossli heim úr Íslandi. Hann var giftur við íslendskari konu, men tá ið hann gekk burtur, flutti konan aftur til Íslands við øllum børnunum.

Leygardagin á jóansøku er ætlanin at seta upp eina minnisplátu yvir Jógvan við Krossli og sunnudagin er ætlanin at fara eina rundferð í Suðuroynni.

Sunnukvøldið verður ættarveitsla á Hotel Øravík.

Tey, sum ætlar sær við á veitsluna, skulu siga frá í seinasta lagið hóskvøldi 24.- juni á Hotel Øravík, tlf. 371302 ella á 214823.